## Skipan av double kappingarárið 2018/2019

Double-kappingarnar vera 4 í tali og allar verða leygardag kl 16.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni dartfo.com inntil hóskvøld kl 22.

Kappingarnar verða skipaðar sum bólkaspæl, har eitt ávíst tal av pørum síðan fer víðari í cup. Við 13-24 pørum verður spælt í 4 bólkum og cup16. Við 25 pørum ella fleiri verður spælt í 8 bólkum og cup32.

Ávíkavist 4 ella 8 pør verða seedað eftir styrkilistanum (fyrstu kapping verður seedað eftir FM í double 2017).

Spælt verður best av 5 settum í bólkunum

Cup-dystirnir verða best av 7 settum, tó semifinala best av 9 settum og finala best av 11 settum.

## Stig til rankinglista:

Stig verða givin til hvørt **parið** soleiðis:

Par nr. 1 fær 11 stig

Par nr. 2 fær 8 stig

Par nr. 3-4 fáa 5 stig

Par nr. 5-8 fáa 3 stig

Par nr. 9-16 fáa 1 stig

## Fyriskipan av kappingum:

Í hølinum skulu verða minst 8 skivur at spæla á.

Telda og printari skulu vera til taks (netsamband er ikki neyðugt).

Ein persónur **skal** hava heiti sum kappingarleiðari. Hann skipar kappingarnar eftir tí telduforriti, sum hann fær útleverað frá DSF.

Kappingarleiðarin ásetur skrivarar til allar dystir.

Kappingarleiðarin hevur mynduleika at burturvísa spælarum, sum:

- ikki møta til dyst
- eru ov ávirkaðir til at spæla við skili
- sýna vánaligan ítróttaranda
- áhaldandi ikki møta til at skriva dystir

**Luttøkugjøld:**

Tað kostar 200 kr. fyri hvørt parið pr. kapping (100 kr í árligum licensi er eisini galdandi fyri double)

Feløgini gjalda 30% av luttøkugjaldinum til DSF. Henda upphædd verður brúkt sambært samtykini á eftirmetingarfundinum 2018.

**Kappingardagar:**

15. sep. 2018 ADF

03. nov. 2018 HDF

02. feb. 2019 ADF

09. mar. 2019 VDF

**FM-endaspælið 27.04.19**

FM-endaspælið verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 27. apríl 2019.

FM í double verður avgjørt millum 4 tey bestu pørini á styrkilistanum fyri double (um avboð verða, sleppur næsta parið á listanum við).

Eru pør jøvn í stigum eftir 4 kappingar, verður hugt eftir, hvør hevur flest 1.-pláss, flest 2.-pláss o.s.fr.

Fyrst verða hálvfinalur, best av 9 settum. Onnur hálvfinalan er nr 1 móti nr 4, hin er nr 2 móti nr 3.

Síðan verður finala, best av 11 settum.